| **Heiti á verkætlan**:<br>"Semi automatisk egning á landi "<br>Samegning | **Ár byrjan og endi**:<br>01-01-2024 -- 01-09-2025 |
|---|---|
| **Skrivað hevur**:<br>Navn: Meinhard Jacobsen<br>Stovnur ella virki: Sp/f Nípan<br>t-postur: meinhard@faroe.com | |

**Endamálið við verkætlanini**:
At framleiða eina semiautomatiska maskinu sum kan egna línu í Skúrðum á landi. Línan skal hanga á stokkum, egningarferðin skal verða upp til 1200 húkar um tíman svarandi til 4 vanligar stampar.

Línan skal dragast ígjøgnum egningamaskinuna av einum spæli og skal samstundis kveylast niður í eitt ílat – 1 persónur skal kunna passa maskinun, hesin skal leggja agn í hana og leggja teir engdu húkarnar niður í ílatið so hvørt sum teir eru engdir

Maskinan skal kunna stillast soleiðis at at agnstøddin kann broytast, maskinan sker agnið til í longd.

**Samandráttur av úrslitum**:

Verkætlanin byrjaði beinanvegin játtanin kom tann 25 januar 2024.

Fyrst var ein prototypa gjør sum vísti á princippið sum vi ætlaðu at gera maskinuna eftir.
Hendan prototypan hevði sum fyrsta mál at fáa húkin at venda rætt tá ið hesin skuldi víðari ígjøgnum maskinuna fyri at verða engdur.

Prototypan virkaði eftir ætlan og so var farið undir at tekna tí endaligu maskinuna – hugt var eisini eftir hvussu ið maskinan frá Mustad ( tann sum er umborð á línubátunum) virkar.

Tá ið tekningin var liðug var farið undir at byggja sjálva maskinuna. Í hesum sambandi skuldu vit velja nakrar motorar og styringar sum skuldu nýtast fyri at fáa maskinuna at koyra eftir ætlan .

Tað tók rúma tíða at finna teir lutir ið vit ynsktu at nýta til maskinuna.

Eftir at deilirnir vóru funnir og keyptis so var sjálv maskinan gjørd.

Vit hava royndarkoyrt maskinuna og vit meta at hon riggar eftir ætlan

Eitt spæl dregu línuna ígjøgnum maskinuna sum egnir húkarnar – en persónur kann síðan leggja hesar engdu húkar niður í ein stamp.

| **Váttan/undirskrift frá verkætlanarleiðara**: | Meinhard Jacobsen |
|---|---|